# Øll alivinnan á fundi um aling

**Hóast føroyska alivinnan er í djúpum aldudali í løtuni, er áhugin fyri aling ikki burtur. Hetta prógvaði ein fundur, ið Hans Jákup Mikkelsen og Vinnuhúsið skipaðu fyri mikumorgunin**

ALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikudagin skipaði Hans Jákup Mikkelsen, sum dagliga starvast í Vinnuhúsinum, fyri fundi á Hotel Føroyum um aling.

Høvuðsheitið á fundinum var: "Er møguligt at fáa hægri prís fyri føroyska laksin?"



*Umboð fyri alla ta føroysku alivinnuna vóru á fundi á Hotel Føroyum mikumorgunin undir heitinum: "Er møguligt at fáa hægri prís fyri føroyska laksin?". Stórur áhugi var fyri fundinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Verkætlan

Hans Jákup arbeiðir við eini verkætlan um alifisk, sum BP fíggjar. Verkætlanin snýr seg um at kanna umstøðurnar hjá føroyskum alilaksi og at fáa at vita, hvat gerast kann fyri at betra um umdømið, sum føroyski laksurin hevur. Endamálið er at fáa meira fyri fiskin.

Stigtakarin sigur, at fundurin á Hotel Føroyum var væl møttur, og hann heldur, at tiltakið eydnaðist væl.

– Umboð fyri alla alivinnuna í Føroyum vóru við, umframt umboð fyri fíggingarstovnar og vinnumálaráðið.

Hann vísir á, at hóast føroyska alivinnan í dag er í einum djúpum aldudali, er ikki líkt til, at áhugin fyri og trúgvin uppá eina føroyska alivinnu er burtur.

### Skotar við

Í samband við arbeiðið við verkætlanini, hevur Hans Jákup havt samband við eitt nú skotsku alivinnuna, og í hesum sambandi vóru tveir skotar, sum hava drúgvar royndir innan alivinnu, við á fundinum.

– Á fundinum greiddu skotarnir frá, hvat teir hava gjørt fyri at betra um prísin – og við góðum úrsliti, sigur Hans Jákup, sum sjálvur greiddi frá, hvat gerast kann á marknaðinum fyri at fáa betri prísin.

Odd Eliassen, sum starvast á Havsbrún í Fuglafirði, greiddi frá møguleikunum at framleiða øðrvísi fóður.

Leif av Reyni, sum starvast hjá Fiskaaling, tosaði um góðskueginleikar, og hvat gerast kann fyri at betra um dygdina á fiskinum.

Hans Jákup Mikkelsen sigur seg vera ógvuliga væl nøgdan við uppmøtingina til fundin, og hann fegnast ikki minst um, at øll alivinnan var við, umframt fíggingarstovnar og landsmyndugleikar.

– So, hóast alivinnan hjá okkum ríður lágt í løtuni, er áhugi og harvið eisini vón fyri framman, sigur Hans Jákup Mikkelsen.



*Fýra framløgur vóru á fundinum, og eitt nú greiddu skotar frá, hvat teir hava gjørt fyri at betra um prísin – við góðum úrsliti, sigur Hans Jákup Mikkelsen, sum saman við Vinnuhúsinum tók stig til fundin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eysturoyggin slóðar fyri í eldrarøkt

**Í heyst eru eini 46 nýggj pláss útvegað á eldrasambýlum í Eysturoy. Haraftrat er heim fyri demens latið upp í Runavík, og Eysturoyar Røktar- og Ellisheim verður nú útbygt við 24 plássum aftrat**

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kommunurnar í Eysturoy hava tikið stór tøk á eldraøkinum seinastu árini, og serliga nú í heyst er nógv hent á hesum øki.

Í Leirvík og á Toftum eru nýggj og snotulig eldrasambýlir júst tikið í nýtslu, og um fáar dagar verður væntandi móttøka á eldrasambýlinum, sum bygt verður í Norðragøtu.



*Ása Hanusson er leiðari fyri heimarøktini í Eysturoy. Her er hon til móttøku í eldrasambýlinum á Toftum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Felags fyri sambýlini í Leirvík, Toftum og Gøtu er, at íløgan liggur um eina miljón fyri hvørt búfólkið. Um hetta er nógv ella á einari leið, duga vit ikki at meta um. Tað veldst sjálvsagt um, hvussu nógv er fingið fyri peningin, sum lagdur er í hesar byggingar.

Spurningurin er hinvegin, um vit náa á mál og kunnu nøkta tørvin á eldrarøkt kring landið, um íløgan liggur um eina miljón fyri hvørt fólk, sum hevur tørv á stovni.

Taka vit Eysturoynna, er tað neyvan tann stóri trupulleikin, um íløgan liggur um miljónina, tí við teirri bygging, sum nú er farin fram á hesum øki í oynni, man fyribils tørvurin á stovnsplássum – saman við útbyggingini av Røktar-og Ellisheiminum og heiminum fyri demens í Runavík – nærum verða nøktaður.

Og tað er ófrøt.

Á Eiði var móttøka í eldrasambýlinum mikudagin í samband við, at kjallarin nú er vorðin innrættaður og tikin í nýtslu.

Í ovaru hæddini er pláss fyri 10 búfólkum, og í kjallarahæddini er pláss fyri 5.

Eldrasambýlið á Eiði, sum nú hevur pláss fyri 15 búfólkum, stendur í umleið 6 miljónum krónum, og á Eiði halda tey, at har hava tey fingið nógv fyri pengarnar.

Hvørt búpláss í eldrasambýlinum á Eiði kostar soleiðis munandi minni enn búplássini í eitt nú Leirvík, Toftum og Gøtu.

### Stór tøk

Tað er eitt stórt tak fyri eina kommunu at byggja ein slíkan stovn, tí almenni parturin av íløguni er lutfalsliga lítil.

Landið rindar nevniliga 50.000 krónur av íløguni fyri hvørt búfólk, tá ið talan er um eldrasambýlið, men 500.000 krónur, tá ið ellis- og røktarheim verða bygd.

Aftrat íløgunum, sum kommunurnar gera, noyðast tær eisini at rinda fyri náttarvaktina, og á Eiði snýr hesin kostnaður seg um eina hálva miljón krónur um árið.

Annars liggur raksturin av eldrasambýlunum undir Heimarøktini, sum landið fíggjar.

Tað eru tey, sum halda, at tað almenna átti at borið allan raksturin og soleiðis eisini náttarvaktina á eldrasambýlunum. Men hóast kommunurnar kunnu vera ósamdar við landsmyndugleikarnar um hendan partin av rakstrinum, rinda tær sum er náttarvaktina við gleði, tí hetta tænir borgarunum í kommununum. Kortini halda tær, at landið eisini eigur at bera hendan partin av rakstrinum.





*Lotta er ein av teimum mongu føroysku børnunum, sum hava verið við til at pakka jólagávur til fátøk børn úti í heimi. Niður í eina skógvaeskju legði hon gávulutir til eina gentu á sínum egna aldri og merkti pakkan, so tað sæst, at hesin pakkin er til eina gentu*

# 1760 jólagávur úr Føroyum til neyðstødd børn

**Christmas Child varð fyri fyrstu ferð roynt í Føroyum í fjør, tá samkoman Lívdin í Hoyvík savnaði og sendi 250 skógvaeskjur við jólagávum til neyðstødd børn úti í heimi. Í ár hava fleiri samkomur verið við og inn komu heilar 1760 eskjur**

CHRISTMAS CHILD
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

So upprann tann stóri dagurin, tá teljast skuldi, hvussu nógvar skógvaeskjur við jólagavum til neyðstødd børn úti í heimi tað hevði eydnast at savna inn.

Og tað má sigast at hava eydnast sera væl, tí málið í ár var at senda 1000 eskjur avstað, men nú avtornaði, var talið heilar 1760 eskjur.

Seinastu eksjurnar vórðu pakkaðar mikudagin og eru nú klárar at fara umborð á skipið, sum skal flyta tær til Onglands. Haðani fara fólk til fyrrverandi kommunistisku londini við eskjunum úr Føroyum.

Tað var sunnudagsskúlin í samkomuni Lívdini í Hoyvík, sum í fjør byrjaði við Christmas Child tiltakinum í Føroyum og sendi 250 jólagávueskjur av landin-um.

- Í ár royndu vit at fáa fleiri samkomur, kirkjur og onnur at luttaka í tiltakinum og harvið fáa fleiri eskjur avstað og náa út til enn fleiri børn, siga tey á heimasíðuni hjá samkomuni.

– Vit standandi undrandi og takkandi, og bøn okkara er, at Harrin má signa øll, ið hava givið og øll, ið fara at fáa gávurnar, siga tey í Lívdini.

### Alheims tiltak

Átakið Operation Christmas Child hevur mong ár á baki, og í fjør vórðu savnaðar yvir 6,6 milliónir skógvaeskjur í ymsum londum, sum vórðu latnar líðandi børnum í 95 londum.

Felagsskapurin aftanfyri Operation Christmas Child er Samaritan's Purse, ið er ein kristin hjálparfelagsskapur. Franklin Graham, sonur prædikumannin Billy Graham, er leiðari fyri felagsskapinum.

Í høvuðsheitum snýr átakið seg um at fylla eina tómu skógvaeskju við ymiskum til drong ella gentu í einum ávísum aldursbólki. Skógvaeskjur verða nýttar, tí tær eru javnt stórar, og tí verður ikki mismunur gjørdur á støddini á gávunum.

### Gávumild børn

Nú arbeiðið í Føroyum fyri í ár er liðugt, og skógvaeskjurnar eru savnaðar í avskipingarhølunum hjá Skipafelagnum, klárar at verða avskipaðar til Bretlands, gongur sjón fyri søgn, at føroysk børn, foreldur, ommur og abbar hava eitt stórt hjarta, tá talan er um at rætta eina hjálpandi hond til neyðstødd børn úti í heimi. Mong úti um oyggjaland okkara hava lagt tíð og pening í at geva eina persónliga kærleiksgávu til eitt treingjandi barn úti í heimi. Saman við ymsum tinganesti er eisini ein persónlig heilsa, so barnið veit, hvaðani gávan eri.

Gávueskjurnar er pakkaðar inn í jólapáppír, tí hetta skal verða ein jólagáva, sum umframt at gleða barnið við tí sum er í eskjuni, eisin skal minna tað á bestu jólagávuna, sum givin er. Lesnaður verður lagdur við í eskjunar í Bretlandi, og hesin lesnaður greiðir frá um Gud sum gav Jesus, heiminum til frelsara, og hvørs føðing vit minnast á jólum.

Umframt allar mongu samkomurnar, hava fleiri einstaklingar latið skógvaeskjur til Christmas Child. Eitt nú hevði ein kona í Æðuvík av sínum eintingum hongt uppslag um tiltakið upp á fiskavirkinum Lynfrost og skrivað, at fólk kundu koma til hana við skógvaeskjum. Úrslitið gjørdist, at hon kom við 32 skógvaeskjum.

Um tú ynskir at verða við í tiltakinum næsta ár, er tað eitt gott hugskot longu nú at fáa tær eina skógvaeskju og byrja at leggja gávulutir í beinanvegin. Á tann hátt kanst tú keypa góðar gávulutir so við og við.

Jú fleiri eskjur koma inn, fleiri verða børnini, ið fáa jólagávur - børn, sum annars einki eiga og kanska ongantíð í lívinum hava fingið eina gávu áður.

***Hesar eru samkomurnar, ið hava verið við í tiltakinum***

**Berøa, Runavík**
**Ebenezer**
**Hebron, Argir**
**Hebron, Leirvík**
**Neria, Skála**
**Filadelfia, Gøtu**
**Filadelfia, Tórshavn**
**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
**Meinigheitshúsið, Argir**
**Nebo, 650 Toftir**
**Kedron, Sørvágur**
**Sunnudagsskúlin í Norðdepli**
**Mizpa, Eiði**
**Elim, Søldarfjørður**
**Siloa, Fuglafjørður**
**Missiónshúsið Thabor, Fuglafjørður**
**Samkomur í Suðuroy**
**Grønu skótar á Húsum**

# Vakrasta barnasongrøddin í Føroyum finnast



*Tað er ilt at taka nakran av børnum framum og velja ein favorit, men ein, ið skarar framúr og heilt avgjørt kann blíva til nakað innan songverðina, er Ingibjørg Hansen úr Mikladali. Á framúrskarandi hátt framførir hon sangin "Crazy" hjá Patsy Cline*

**Leygarkvøldið verður finalan í Nósabarnaprixkappingini á Torginum í SMS. Tað hava verið trý undanumfør, har tvey børn eru sloppin víðari hvørja ferðina**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað er lagt upp til eina sera spennandi sangkapping á Torginum í SMS leygarkvøldið, har vit koma at uppliva nakrar av teimum bestu barnasongrøddunum í Føroyum.

Umframt tvey tey bestu frá hvørjum undanumfari, sleppur eisini besti trýarin við til finaluna. Tað er 8 ára gamla Gunnbjørg Amundsen við sanginum „Bølle Bob". Framførsla hennara var serstakliga góð, og hon dugdi avbera væl at syngja og upptraðka.

Tað er ilt at taka nakran av børnum framum og velja ein favorit, men ein, ið skarar framúr og heilt avgjørt kann blíva til nakað innan songverðina, er Ingibjørg Hansen úr Mikladali. Á framúrskarandi hátt framførir hon sangin "Crazy" hjá Patsy Cline.

Eisini verður skemt á skránni, og verða tað Angela, klovninurin Hannibal , Babyjames og onnur, sum fara at undirhalda.

Nósabarnaprixkappingin byrjar á torginum í SMS klokkan 18.00 leygarkvøldið tann 6. november. Kári Sólstein verður frásøgumaður.

**Barbara Petersen úr Tórshavn, við lagnum "Du kan sige ja-ja".**

**Sofía Lind Rasmussen úr Klaksvík við sanginum hjá Celine Dion "I'm alive".**

**Ingibjørg Hansen úr Mikladali við "Crazy" hjá Patsy Cline.**

**Sharon Zachariassen av Argjum við lagnum „One moment in time"**

**Helena H. Jørgensen og Sunnbjørg Thomassen við „Eingin er sum tú"**

**Dóra Joensen við "Beautiful"**

**Gunnbjørg Amundsen við sanginum „Bølle Bob**